VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Lot til andøvsgul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið frígjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin minni vindur av útsynningi. Regn ella vátakavi av og á og hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin hækkar hann upp í landnyrðing. Ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Sunnudagin upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og kavaælingur, mánadagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 1 og 5 stig.

Linsa eitur hestur mín

Eitt sum Elianu Svøðstein í Kunoy dámar sera væl, er at fáast við sín egna hest – eina ryssu.

HÚSDJÓR
Orð&mynd: Snorri Brend

Kunoy: - Linsa hevur eina sera góða ættartalvu, sigur Eliana.

Hon er uppkallað eftir mammuni, sum var ættað úr Miðvági, og sum var ein av raskastu hestunum í Føroyum til nærum øll sløg av ríðing. Pápin kallast Pegasus.

Hon fekk ryssuna fyri einum ári síðani, men enn hevur hon ikki riðið við henni.

Linsa er nevniliga ov ung til tað. Ikki fyrrenn á ólavsøku komandi ár kann Eliana so smátt byrja at venja ryssuna við at ganga, ríða og annað.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri hestum, og nú eg fekk mín egna, er tað sum um ein dreymur er gingin út, slær unga hestakvinnan úr Kunoy fast.

Eftir hennara hugsan er ein hestur eitt sera vakurt djór, og til ber eisini at fáa eitt gott forhold til ein hest, um ein vísir áhuga og tol.

Í bygdini er í øllum førum ein maður, sum hevur sama áhuga fyri hestum sum Eliana. Hann fegnaðist sjálvandi um, at onnur eisini høvdu sama áhugan, og gav hann millum annað Elianu eina spennandi bók um hestar.

Eliana hevur síðani lisið ein hóp av bókum um hestar, men hon er so líðandi komin fram til eina niðurstøðu: Eingin av hesum bókunum sigur tað sama!

- Tí eri eg givin at lesa bøkur og fylgi bara mínum egnu ráðum um hestar, sigur hon við einum brosi.

Eliana Svøðstein hevur júst verið í haganum eftir ryssuni Linsa. – Hestur er eitt sera vakurt djór, sigur hon

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-9
Nuuk	-6
Qaqortoq	-7
Ammassalik	-1
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	6
Lerwick	7
Aberdeen	--
London	9
Tromsø	--
Bergen	0
Oslo	--
Stokkhólm	0
Keypmannah.	3
Helsinki	-3
Moskva	0
Berlin	1
Warzawa	1
Kiev	0
Bukarest	3
Paris	9
Madrid	14
Róm	16
Malorca	12
Athen	12
Malta	20
Tunis	19
Beijing	7
New Dehli	24
Bangkok	29
Jakarta	32
Sydney	--
New York	11
Miami	27
Los Angeles	17
Meksikobýur	18
Panama	--
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1007 hPa. yvir Írlandi fer í landnyrðing og dýpist.



Í dag:
Lágtrýstið við Vestur~Noreg stendur mestsum í stað. Lágtrýstið við Hvarvið fer spakuliga eystureftir. Brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar fríggjadagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 27/11 kl. 06⁰⁰ – 28/11. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,6°
Minsti hiti máldur í november: -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 25/11 kl. 06⁰⁰ – 26/11. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 88 mm

Tiltøk í Miðlahúsinum

28. november
Landsbankin

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg

VESTFALLSKYRRINDI

24. november Mánin næstur jørðini
1. desember Seinna kvarter
6. desember Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
28. Nov.	09.40	22.06	08.40	21.06	08.55	21.21	11.40	-	00.10	12.40	07.55	20.21	06.55	19.21	09.55	22.21	10.55	23.21	09.25	21.51	10.40	23.06
29. Nov.	10.33	22.56	09.33	21.56	09.48	22.11	00.06	12.33	01.06	13.33	08.48	21.11	07.48	20.11	10.48	23.11	11.48	-	10.18	22.41	11.33	23.56
30. Nov.	11.20	23.56	10.20	22.56	10.35	23.11	00.56	13.20	01.56	14.20	09.35	22.11	08.35	21.11	11.35	-	00.11	12.35	11.05	23.41	-	12.20
1. Des	-	12.31	11.31	-	11.46	-	01.56	14.31	02.56	15.31	10.46	23.20	09.46	22.20	00.11	12.46	01.11	13.46	-	12.16	00.56	13.31
2. Des	01.05	13.39	00.05	12.39	00.20	12.54	03.05	15.39	04.05	16.39	11.54	-	10.54	23.14	01.20	13.54	02.20	14.54	00.50	13.24	02.05	14.39